## Eftir skoraseyði

Leygardagin vóru tjørnuvíkingar í Stakkinum og sumbingar í Hólmanum eftir seyði, og sama dag vóru sandavágsmenn í Vestaruskor eftir seyði, sum hevur gingið har í summar. Seyðurin lá høgt hendan morgunin, men tað gekk væl at fáa hann niður. Í vár vórðu 19 seyðir sleptir í Vestaruskor. Men leygardagin vóru bara 15 at síggja, og 14 komu inn, skrivar joanisnielsen.fo. Onkur veðrur varð flettur leygarkvøldið, og tann besti vigaði 80 pund.



## Eingin olja enn

Skuldi amerikanski jarðfrøðistovnurin havt rætt í, at olja fyri meiri enn 10.000 mia. krónur er í undirgrundini í útnyrðingspartinum av Grønlandi, fara nøkur ár at ganga, áðrenn tann fyrsta oljan kemur undan kavi. Jørn Skov Nielsen hjá rávørustýrinum sigur við útvarpið í Nuuk, at ein politisk avgerð um at leita kemur ikki fyrr enn seint næsta ár, og møgulig leitingarloyvi í Útnyrðingsgrønlandi verða ikki boðin út fyr enn í 2010 ella í 2011.

# Semja um fíggjarlóg

**Magni Laksáfoss, fíggjarmálaráðharri, greiddi á tíðindafundi seinnapartin fríggjadagin frá, at samgongan hevði gjørt semju um fíggjarlógina fyri komandi ár**

FÍGGJARLÓG
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tað hevur verið togað aftur og fram um fíggjarlógina fyri komandi ár, og fleiri gitingar hava eisini verið frammi um, at samgongan var í vanda fyri at slitna og nýval útskrivað. Men seinnapartin í dag kundi Magni Laksáfoss boða frá, at funnið var fram til eina semju í spurninginum um komandi fíggjarlóg.

Magni Laksáfoss segði, at talan var um eina søguliga hending, tí ongantíð áður hevur ein tálmandi fíggjarlóg verið løgd fram í einum valári. Men tað hendir so nú.

Endamálið við hesari fíggjarlógini er greitt, at tálma búskapinum og at køla ta ovurhiting, sum er. Og samstundis sum miðað verður ímóti at at tálma búskapin við 0,7% av BTÚ, verður farið frá at leggja dent á asfalt og betong til tey bleytaru virðini, vísti fíggjarmálaráðharrin á.

### Skattalættin tødnaður

Talan verður um tálming av bæði íløgum og rakstri eins og inntøkusíðan eisini verður tálmað. Miðað verður eftir einari tálming upp á 85 milliónir, og tað svarar sum nevnt til 0,7% av BTÚ. Ætlanin er, at avlopið á fíggjarlógini fyri komandi ár skal verða millum 150 og 200 milliónir.

Eisini skal raðfestast øðrvísi komandi ár. Umhvørvið, útbúgving og gransking og vælferð skal raðfestast høggt. Í staðin verða íløgurnar í vegir og tunlar lækkaðar, tó so, at flogvøllurin skal útbyggjast fyri 65 milliónir.

Í sambandi við umhvørvið verða játtaðir pengar soleiðis, at tilbúgvingin kann verða klár, um eitt líknandi óhapp sum tað við Olshanu skuldi hent í framtíðini. Útvegast skal neyðug útgerð at standa ímóti tílíkum óhappum.

Annars standa sparingarnar í mestan mun av, at ætlaði skattalættin verður minkaður við einum triðingi umframt at avgjøld verða hækkað, serliga á sigarettum, góðgæti og sodavatni.

Seinasta freist at leggja uppskot um fíggjarlóg fram, er komandi týsdag klokkan sekstan.



*Magni Laksáfoss legði fríggjadagin fram fíggjarlógaruppskot fyri komandi ár. Uppskotið er úrslit av eini semju millum samgonguflokkarnir*

*Mynd: Leo Poulsen*

# Alt ov stór øking

**Anfinn Kalsberg, fíggjarnevndarformaður, er langt frá hugtikin av nýggja fíggjarlógaruppskotinum. Hann heldur, at økingin á útreiðslusíðuni er mest at kalla vill**

FÍGGJARLÓG
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tað er í góðum tíðum at møguleikin er fyri, veruliga at tálma á fíggjarlógini. Og tað høvdu vi tein søguliga møguleika til, men vit nýttu hann ikki.

Tað sigur Anfinn Kalsberg, fíggjarnevndarformaður. Fyrrverandi floksformaður Fólkafloksins dylir ikki fyri, at ein vøkstur á fíggjarlógini frá 2007 til 2008 upp á 250 milliónir krónur er alt ov nógv.

- Tað talið er minst hundrað milliónir ovn ógv, sigur Anfinn Kalsberg.

### Gyltur møguleiki

- Talan er jú um ein veldugan inntøkuvøkstur upp á einar 300 milliónir, sum svarar til 8%. Og tá vit so økja útreiðslurnar við 6,25%, so er tað alt ovn ógv eftir mínum tykki, sigur Anfinn Kalsberg.

Hann sigur, at tað hevur eydnast væl við førda fíggjarpolitikkinum fyrstu trý árini. Tá vaks fíggjarlógin við áleið hundrað milliónum um árið uttan í fjør, tá vøksturin gjørdist 180 milliónir, sum Anfinn Kalsberg metir var ov nógv.

- Vit hava havt hendan inntøkuvøksturin orsakað av skattalætta og vælsnarandi samfelagshjólum. Men vit kunnu ikki rokna við slíkum inntøkuvøkstri á hvørjum ári, og tí hevði tað verið ein gyltur møguleiki nú at bremsa og tálma útreiðslunum so tað veruliga munti, sigur Anfinn Kalsberg, fíggjarnevndarformaður.



*Anfinn Kalsberg fílist á, at fíggjarlógin økist alt ov nógv*